Hús & Heim
snorri@sosialurin.fo



*Í dag er talan um eitt minni arbeiði hjá Jan Mohr, her hann setur takrennu í hjá ommu síni, Miu á Støðini í Gøtu. Men annars eru hann og hansara menn í ferð við tvey størri arbeiðir í Fuglafirði og í Runavík*
*Mynd: Bárður*

# Bæði stór og smá arbeiði

**- Fyrr smíðaðu vit mest sethús. Men nú er talan meiri um størri arbeiðir, sigur timburmaðurin, Jan Mohr úr Fuglafirði**

HANDVERK
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Gøta:** - Vit hava nokk at gera beint nú. Ja, vit hava faktiskt tað, sum man skal brúka.

Uppi í einum stilladsi í Gøtu stendur fuglfirðingurin, Jan Mohr. Í dag er talan um at gera klárt at seta eina takrennu í. Men dagliga er hann við í nógv størri arbeiðum enn hetta.

Jan hevur nevniliga einar 10 mans í arbeiði, og er í løtuni ein partur av einum størri arbeiði í Fuglafirði og einum størri arbeiði í Runavík.

- Fyrr arbeiddu vit mest við sethúsum. Men ta seinastu tíðina hevur tað mest verið slík størri arbeiðir, sum hesi, sigur hann.

## Stór arbeiði

Henda dagin vit vitjaðu Jan, var hann í ferð við at rigga hesi húsini hjá ommu síni í Gøtu til tann stóra føðingardagin. Omma hansara er ikki ein og hvør, tí nakað eftir vitjanina fylti henda konan, Mia á Støðini 100 ár.

Teir høvdu frammanundan skift takið út, og nú var túrurin so komin til úthangið og takrennurnar.

Tey størru arbeiðini, sum Jan er við í, er í fyrsta lagi at gera ein nýggja deild til Føroya Sparikassa í Fuglafirði. Hetta arbeiðið skal verða liðugt í ár.

Samstundis við hetta eru menn hjá honum við í arbeiðinum at víðka um Røktar- og Ellisheimið í Runavík við 24 íbúðum. Hetta arbeiðið skal verða liðugt í mars mánað næsta ár.

– Í løtuni hava vit ikki onnur størri arbeiði fyri framman. Men sum er, eru vit bookaðir hetta árið út og nakað inn í næsta ár eisini, sigur Jan.

# Besta træverjan til okkara veðurlag

**Innihaldið av turrevnum sigur nakað um dygdina í træverjuni og um haldbarið. Við dupultari nøgd av turrevnum í mun til vanligu málingina, kunnu tær nýggju framleiðslurnar hjá Pinotex Plus ikki skýrast annað enn ein kollvelting.**

MÁLING

Pinotex vóru teir sum komu við nútíðar træverjuni – og tað í ein slíkan mun, at nógv í dag brúka hetta sum eitt orðafelli, tá tey viðgera træið: - Vit pinotexera trævekið!

Nú er eitt nýtt ættarlið av Pinotex til reiðar við eini heildekkandi og við eini gjøgnumskygdari útgávu, har dentur er lagdur á størri dýpd og betri verju.

Samstundis hevur tann nýggja Pinotex Superdec Plus eini ótrúlig evni at dekka, og er haraftrat sera løtt at smyrja á træið.

- Hetta eru bestu tíðindi, bæði fyri træverkið og fyri húsaeigarar, síðani vit byrjaðu við Pinotex fyri meiri enn 40 árum síðani, sigur




menningarleiðarin hjá Pinotex í Danmark, Jørgen H. Olsen.

Hann sigur, at umframt ta góðu verjuna, so hevur Pinotex Plus eisini eitt sera langt haldbari. Hon heildekkar heilt upp í 12 ár, og tann gjøgnumskygda upp í sjey ár.

## Føroyskt veðurlag

Aftanfyri hetta liggur gransking og royndir í eitt longri áramál. Við hesum royndum er innihaldið av turrevnum komið heilt uppá 60% - dupult so nógv sum í vanligari træverju.

Høga innihaldið av turrevnum, saman við betri innsókn í træið, gevur eina sterkari yvirflatu, sum varðveitir sín glans og lit ár eftir ár.

Pinotex Plus er roynd undir bestu – ella ringast – hugsandi umstøðum, fyri at tryggja at hon veruliga verjir træið, bæði betri og longur móti sól, regni, vindi, kavaódn, frosti og øðrum. Hetta er júst slíkt veðurlag, sum eru viðkomandi her á landi.

Bæði tann heildekkandi og tann gjøgnumskygda málingin fáast í mongum vøkrum litum.



*Stinge Haugsbø og Rune Ness, saman við dóttrini búgva í nýggjum húsum*
*(Mynd: VG)*

## – Vit hava tað fínt

Hóast tey eru ung, so hava norsku Rune Ness (23) og Stinge Haugsbø (21) bygt sær stór hús í norska býnum Førde og hava haraftrat keypt sær tveir bilar.

– Vit hava valt at byrja tíðliga við láni, men tað merkir so aftur at vit niðurgjalda tað, meðan vit framvegis eru ung.

– Nú hava vit bæði hús, bil og alt tað, sum vit hava tørv á, sigur Rune við norska blaðið VG. Tá tey skuldu byggja hús teirra í trimum hæddum, har hvør var 100 fermetrar, settu tey seg í samband við fleiri bankar. Tað var kortini bert tann lokali bankin, sum vildi veita teimum lán, tí teir hildu tað vera positivt at eitt ungt par vildi seta føtur undir egið borð.

– Vit hava 1,5 mió. í láni í húsinum og nakað av láni í bilunum. Meginpartin av lønini fer til húsið, og vit brúka ikki pening uppá annað enn tað, sum vit skulu. Vit vóru ikki heilt vís í um vit kundu lána so nógv, men vit settu tó upp eina fíggjarætlan frammanundan, sigur hann.

Parið, sum gjørdust foreldur fyri fýra mánaðum síðani, hevur tikið hædd fyri rentuvøkstri og hava bundið rentuna uppá helmingin av láninum í 10 ár. – Nú kann eg koma heim frá arbeiði, seta meg niður í sofuna og hugsa: Alt hetta er mítt. Tað er ein góð kensla, sigur Rune Næss.

LITAVAL - um alt landið
Sosialurin 341800